# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Hillary Clinton er ein skilagóð kvinna, sum hevur prógvað, at hon stríðist fyri at røkka sínum málum (Henry Kissinger)*

# Bert Bill kann forða Hillary í at gerast uttanríkisráðharri



*Barrack Obama og Hillary Clinton dystaðust um uppstillingina hjá demokratunum. Nú verður hon kanska ráðharri hjá honum*
*Mynd: Polfoto*

Republikanararnir halda tað vera eitt gott hugskot, at Hillary Clinton verður uttanríkisráðharri

Barrack Obama hevur sett ein bólk av løgfrøðingum at kanna tey persónligu og tey fíggjarligu viðurskiftini hjá Bill og Hillary Clinton, tí tey skulu vera í lagi, fyri at Hillary kann taka við sum amerikanskur uttanríkisráðharri.

The Times skrivar, at løgfrøðingarnir hava millum annað kannað viðurskiftini hjá stovninum Clinton Global Initiative, sum stríðist ímóti AIDS, malaria og fátækradømi í Afrika og Asia. Samstundis hava løgfrøðingarnir kannað, hvat samband Bill Clinton hevur við ymisk lond og fyritøkur, sum framleiða heilivág.

- Hetta kann vera tann fyrsta forðingin. Hann ger eitt gott arbeiði, og eingin vil forða honum í at gera tað. Men vit mugu tryggja okkum, at hansara virksemi ikki kann elva til trupulleikar, sigur ein av ráðgevunum hjá Obama við The Times.

Teir løgfrøðingarnir, sum hava kannað tey fíggjarligu viðurskiftini hjá Clinton-hjúnunum, hava sambært The Times kært seg um vantandi samstarvsvilja frá hjúnunum, men hetta sigst vera betur nú, skrivar blaðið.

## Góð viðmæli

Bill Clinton hevur sagt, at eftir hansara tykki fær USA ein góðan uttanríkisráðharra, um Barrack Obama ger av at velja Hillary Clinton til tað embætið.

Republikanararnir halda eisini, at hon er eitt væl egnað boð upp á uttanríkisráðharrastarvið.

- Hon er ein sera skilagóð kvinna, og hon hevur prógvað, at hon er til reiðar at stríðast fyri at røkka sínum málum. Hon hevði verið eitt sera gott val, sigur fyrrverandi republikanski uttanríkisráðharrin Henry Kissinger við Bloomberg News.

Jon Kyl fra Arizona, sum er næstformaður í republikanska tingbólkinum í Senatinum, sigur við Fox News, at Hillary Clinton er væl egnað sum uttanríkisráðharri. Hann vísir millum annað á, at hon hevur drúgvar royndir.

Ein annar kendur republikanari, guvernørurin Arnold Schwarzenegger sigur, at Obama tekur eina skilagóða avgerð, um hann fær sær Hillary Clinton til uttanríkisráðharra.

# Aftur bardagar í DL Kongo

**Vápnahvíldin har eysturi í tí borgarakrígsherjaða DL Kongo helt ikki leingi, og Frakland vil hava fleiri ST-hermenn til landið**

Harðir bardagar eru brostnir á har eysturi í Dermokratiska Lýðveldinum Kongo, hóast uppreistrarleiðarin, Laurent Nkunda, hevði givið ST lyfti um at halda avtaluna um vápnahvíld.

Sambært tíðindastovuni AP eru bardagar millum kongolesiska stjórnarherin og uppreistrarmenn góðar 100 kilometrar norðan fyri landspartahøvuðsstaðin Goma. Ein talsmaður hjá ST segði í morgun, at partarnir royna eftir øllum at døma at reka hvør annan eitt sindur eftir hæli, áðrenn ein møgulig vápnahvíld kann fáast í lag.

Laurent Nkunda hevur boðið stjórnini samráðingar um eina friðarliga loysn á kreppuni, men higartil hevur stjórnin víst tilboði hansara aftur.

Uppreistrarmenninir siga, at teir tóku bardagarnar uppaftur fyri at verja tutsi-minnilutan har eysturi í Kongo ímóti ágangi frá hutu-herliðum, sum vóru við í hópdrápinum í Rwanda í 1994, og sum síðani flýddu til Kongo. ST sigur, at bardagarnir millum uppreistrarherin og stjórnarherin hava rikið fleiri hundraðtúsund fólk frá húsi og heimi, og at mong flóttafólk líða illa av sjúkum og vantandi mati.

## Fleiri hermenn

Frakland hevur lagt eitt uppskot fyri ST-trygdarráðið um at senda næstan 3.000 ST-hermenn og løgreglumenn afturat til Demokratiska Lýðveldið Kongo, har teirra høvuðsuppgáva skal vera at verja sivilfólkið.

ST hevur 17.000 hermenn í DL Kongo, men teir hava ikki verið førir fyri at steðga bardøgunum. Heimildin hjá teimum verandi ST-hermonnunum rennur út á nýggjárinum, men ætlanin er at leingja hana. Franska uppskotið er so, at tann heimildin skal umfata næstan 3.000 hermenn og løgreglumenn afturat.



*Laurent Nkunda, generalur og uppreistrarleiðari*
*Mynd: AP*